*Heygadrangsdómurin:*

# Fríkendir í øllum ákærum

*Vantandi eftirlit í landsstýrinum, sum má hava vitað, at tað var ivasamt við eginpeningum í teimum dýru skipunum, legði Eystari Landsrættur m.a. sum grund fyri púra at fríkenna teir fýra menninar í Heygadrangsmálinum*

Summi væntaðu tað, onnur kom tað óvart á, at Eystari Landsrættur í gjár, sjálvan ársdagin fyri bankakreppuna í fjør, staðfesti dómin í Heygadrangsmálinum.
Teir fýra Finnbogi Christiansen, Magnus Petersen, Óli Zachariassen og Kristin Rasmussen vórðu allir fríkendir í øllum ákærum um svik og roynd at svika landskassan, tá teir lótu Heygadrang byggja.

Teir tríggir dómararnir komu til ta niðurstøðu, at tað var so nógv óvissa í málinum, og at henda óvissa máttu sambært vanligum rættarreglum koma teimum ákærdu til góðar, so teir máttu fríkennast. Haraftrat er sera ógreitt, hvussu mannagongdin hevur verið.

### Góðtók slíkt óvanligt

Tað var vanligt, og hetta vistu øll, at landsstýrið góðtók provisiónir og lán frá undirlevrandørum sum eginpening, og eisini í øðrum skipum góðkendi landsstýrið óvnaligar mátar at útvega sær eginpening.

Orðaskiftið var í Føroyum, um eginpeningur nú var í ávísum skipum, og um landsstýrisins eftirlit var nóg gott, men heldur ikki eftir frágreiðingina hjá eginpeninganevndini í 1986 vórðu nøkur politisk tiltøk sett í verk. Umsitingin í Tinganesi royndi at herða eftirlitið við váttanum um eginpening, men bara fyri nýggj skip, og hetta varð ikki almannakunngjørt, tí politisk støða varð ikki tikin til spurningin.

Landsrætturin leggur eisini til grund fyri fríkenning, at Atli Dam, sum var løgmaður tá, helt tað vera tað vera nóg mikið við váttanum frá grannskoðara, advokati, skipsmeklara ella peningastovni sum váttan um eginpening.

### Øll vistu

Landsrætturin heldur tað vera prógvað, at tey, sum høvdu við skipabygging at gera, kundu hava ta fatan, at landsstýrið hevði valt at víkja frá kravinum um eginpening í teimum stóru og dýru skipunum fyri ikki at stepga vinnuligu framgongdini í samfelagnum.

Ákæruvaldið hevur ikki prógvað, at Finnbogi Christiansen hvørki hevði evni ella vilja til at útvega eginpeningin. Onkrar royndir vórðu í hvussu er gjørdar.

### Kundi givið illgruna

Sjálvt um tað ikki var óvanligt við ískoytissáttmálum, so heldur landsrætturin tað vera løgið, at ískoytissáttmálarnir ikki vórðu sendir landsstýrinum til góðkenningar saman við sjálvum bygisáttmálanum. Ískoytissáttmálarnir kunnu geva illgruna um, at eginpeningurin var íroknaður í byggikostnaðinum. Landsrætturin heldur tað tó harvið ikki verða prógvað, at teir ákærdu á hend hátt vildu villeiða landsstýrið.

Í februar 1988 fekk landsstýrið at vita, hvussu støðan var, at eingin eginpeningur var, og at eingin fígging heldur var til skipið. Tá landsstýrið visti hetta, hevði tað eisini vitað, um tað hevði kannað sáttmálan, at eginpeningurin var íroknaður. Og tí ber ikki til at døma teir ákærdu fyri roynd at villeiða landsstýrið.

Ríkiskassin ber allar útreiðslurnar av sakarmálinum.

**randi**

---

Sosialurin hevur í morgin myndir úr Eystara Landsrætti

---

*-Vit fylgja við, men:*

# AP Møller ikki sett kós móti Føroyum

*-Vit fylgja við, hvat hendir á føroyska økinum men hava ongar ætlanir í løtuni um at vera við í komandi kanningum sigur varastjórin í Mærsk Olie og Gas, Bo Wildfang við Tíðindablaðið Sosialin.*



**Jan Müller skrivar úr Keypmannahavn**

Hóast nógv hevur verið gitt í seinastuni um, at stóra danska fyritøkan AP Møller er klár til at leggja seg út í eitt møguligt oljuævintýr við Føroyar, so vísir fyritøkan aftur hesum gitingum.

Tíðindablaðið Sosialurin setti varastjóranum í "Mærsk Olie og Gas", Bo Wildfang spurningin, um hvat fyritøkan heldur um møguleikarnar at finna olju, hvussu hon heldur ein kanningarætlan eigur at verða løgd til rættis, hvørki feløg eiga at vera við osfr.

Svarið vit fingu varð í stuttum hetta:

"A. P. Møller følger gennem Mærsk Olie og Gas AS med i den udvikling, der for tiden foregår på og omkring Færøerne med hensyn til efterforskning efter olie og gas. Vit har imidlertid ingen aktuelle planer om at engagere os heri".


**Skótahúsið KAMBUR á Kambsdali**



Húsini eru væl útgjørd og vælegnað til legur og skeið við upp til 60 luttakarum

Skúlar, barnagarðar, feløg og onnur, sum vilja leiga húsini, kunnu venda sær til skrivstovuna, tlf 11075

KFUM-SKÓTARNIR Í FØROYUM
Tlf 11075 Hoydalsvegur 6
Postbox 1080 - 110 Tórshavn



**Krani**

av slagnum Volvomobil, árg. 87, til sølu. Vælegnaður til lossing og tílíkt.

**Tlf. 21649, best eftir kl. 18.**



**AVROÐ & KJØT**

**Um tygum hava áhuga at keypa avroð og kjøt, ger so væl at ringja**

**Tlf. 28089 - Páll Patursson, Kirkjubøur**



**Ford Granada**



til sølu.

Tlf. 84448